# Hósdagur 17. oktober

## SVF

17.30 Viftan
18.00 Toktummas 15
18.05 Pocahontas 24:26
18.30 Atlantis High 6:13
18.55 Eitt hundalív
19.25 Taxi — út í verð e
20.00 Dagur og Vika
20.25 Grannar okkara
20.50 Gesturin
21.15 Læknin hevur orðið
21.45 Krimitímin: Blind gudinna 1:4 — norsk krimirøð
22.40 Borð um borð e
23.35 Liðugt

## EUROSPORT

07:30 Sailing: Sailing World
08:00 Golf: Challenge Tour Russian Open Moscow
08:30 Golf: U.S. P.G.A. Tour Ivensys Classic Las Vegas United States
09:30 Football: European Championship Euro 2004
11:30 Sailing: Sailing World
12:00 Xtreme Sports: X-Games 2002
13:00 Xtreme Sports: X-Games 2002
14:00 Tennis (Live): Wta Tournament Zurich Switzerland
15:30 Football: European Championship Euro 2004
16:30 Football: European Championship Euro 2004
17:30 Football: European Championship Euro 2004
18:45 News: Eurosportnews Flash
19:00 Tennis (Live): Wta Tournament Zurich Switzerland
20:30 Sumo: Grand Sumo Tournament (Basho)
21:30 Sumo: Grand Sumo Tournament (Basho)
22:30 News: Eurosportnews Report
22:45 Football: European Championship Euro 2004
00:15 News: Eurosportnews Report

## BBC PRIME

0.00 TLZ: »A History of British Art – My Wife, my Horse«
1.00 TLZ: »Painting the World«
1.30 TLZ: »Painting the World«
2.00 TLZ: »Poppea«
2.35 TLZ: »Lesley Garrett Tonight«
3.05 TLZ: »Computing for the Terrified – Data Remember«
3.35 TLZ: »Bindi Millionaires – Stretch to the Limit«
4.00 TLZ: »Renaissance Secrets – Secret of the…«
4.30 TLZ: »P-Y Gerbeau-Re-Inventing the Wheel«
5.00 TLZ: »Greek Language and People – Buying Things«
5.30 Look Ahead
6.00 Step Inside: »Super Dooper Jezebel«
6.10 The Story Makers: »Show«
6.30 Joshua Jones: »Paperwork«
6.40 VIP: »Ipswich«
7.05 50/
7.30 Ready Steady Cook
8.15 House Invaders: »Thame«
8.45 Going for a Song
9.15 The Antiques Show
9.45 Changing Rooms
10.15 Vets to the Rescue
10.45 Lovejoy: »Somewhere over the Rainbow«
11.45 The Weakest Link
12.30 Passport to the Sun
13.00 Eastenders
13.30 House Invaders: »Wigston«
14.00 Going for a Song
14.30 Step Inside: »Super Dooper Jezebe«l
14.40 The Story Makers: »Show«
15.00 Joshua Jones: »Paperwork«
15.10 VIP: »Ipswich«
15.35 50/
16.00 Barking Mad
16.30 Ready Steady Cook
17.15 The Weakest Link
18.00 Gardeners' World
18.30 Ground Force: »Bournemouth«
19.00 Eastenders
19.30 Dog Eat Dog
20.15 Parkinson Shorts: »Steve Redgrave«
20.30 Chambers: »Conditional Fees«
21.00 The Blackadder: »The Black Seal«
21.30 French and Saunders
22.00 Attachments: »Money Shot«
23.00 Cardiac Arrest: »The Killing Season«
23.30 Cardiac Arrest: »You can't make an Omelette«

## BBC WORLD

00:00 BBC News
00:30 HARDtalk (r)
01:00 BBC News
01:30 Fast Track (r)
01:45 Holiday (r)
02:00 BBC News
02:30 Simpson's World (r)
03:00 BBC News
03:30 Asia Today (r)
03:45 World Business Report (r)
04:00 BBC News
04:30 HARDtalk
05:00 BBC News
05:30 World Business Report
06:00 BBC News
06:30 World Business Report
07:00 BBC News
07:30 World Business Report
07:45 Sport Today
08:00 BBC News
08:30 Fast Track (r)
08:45 Holiday (r)
09:00 BBC News
09:30 HARDtalk (r)
10:00 BBC News
10:30 Simpson's World (r)
11:00 BBC News
11:30 Asia Today
11:45 World Business Report
12:00 BBC News
12:30 HARDtalk (r)
13:00 BBC News
13:30 World Business Report
13:45 Sport Today
14:00 BBC News
14:30 The Car's The Star (r)
15:00 BBC News
15:30 Asia Today
16:00 BBC News
16:30 HARDtalk (r)
17:00 BBC News
17:15 World Business Report
17:30 Talking Movies (r)
18:00 BBC News
18:30 World Business Report
18:45 Sport Today
19:00 BBC News
19:30 HARDtalk (r)
20:00 BBC News
20:30 Click Online
21:00 BBC News
21:30 World Business Report
22:00 BBC News
22:30 Life
23:00 BBC News
23:30 World Business Report (r)
23:45 Asia Today

## TV3

05:00 Garfield Og Venner
05:25 Børnehjørnet
07:00 Tv-Shop
08:40 Tv3 Extra
09:10 Familien Walton
10:10 Familien Walton
11:05 Horton-Sagaen
12:00 Horton-Sagaen
12:55 Ricki Lake
13:50 Havfolket
15:35 Med På Moden
16:05 Ricki Lake
17:00 Alle Elsker Raymond
17:30 Sabrina - Skolens Heks
18:00 Alle Tiders Barnepige
18:30 Tv3 Extra
19:00 Dawsons Creek
19:50 Den Eneste Ene
20:50 Sex And The City
21:30 Mysterious Ways
22:30 Line's
23:30 Tv3 Extra
00:00 Seinfeld
00:30 Strømer I L.A.
01:00 Kodenavn Nikita
02:00 Sunset Beach
02:50 Sunset Beach
03:40 Benny Hill
04:15 Godnat

## ÚF

07.00 Tíðindi
07.05 Morgunlestur - Jákup Magnussen, prestur, lesur
07.15 Barnaløtan - Katrin og Kári stíla fyri
07.30 Tíðindi
07.35 Góðan morgun Føroyar
08.00 Tíðindi
08.03 Góðan morgun Føroyar
09.00 Tíðindi
09.03 Sjónarringurin - Árni Joensen leggur til rættis
09.35 Dagsins tónar
09.50 Morgunlestur (e) - Jákup Magnussen, prestur, lesur
10.00 Tíðindi
10.03 Fimleikaløtan 2
10.10 Tit skriva, vit spæla
11.00 Tíðindi
11.03 Á saganna veingjum
12.00 Veðurtíðindi
12.02 Middagstónleikur
12.15 Skráin og lýsingar
12.20 Tíðindini
12.40 Døgurðatónar
13.00 Tónatímin
14.00 Fimmarin (e) - Jóhann Mortensen leggur til rættis
15.00 Tíðindi
15.03 Nýtt og gott gamalt - Birgar Johannesen velur løgini
16.00 Tíðindi
16.03 Í víngarðinum
17.00 Tíðindi
17.05 Viðurgerði - Sending við reportasjum, samrøðum og frásagnum úr Suðuroy.
18.00 Barnaløtan (e) - Katrin og Kári stíla fyri
18.25 Skráin og lýsingar
18.30 Tíðindini
19.00 Skiftissiðir á lívsleiðini - triðja sending - Armgarð Arge leggur til rættis
19.30 Crescendo - Kári Olsen stílar fyri
20.30 David Copperfield - Elin Heinesen lesur 6. part av framhaldssøgu eftir Charles Dickens. Jens Pauli Heinesen týddi.
21.00 Tíðindi
21.05 Dagsetur - Femja Petersen leggur til rættis
22.00 Tíðindi
22.00 Ljóðmúrurin - Regin Egholm skipar fyri
23.00 Tíðindi

# Skiftissiðir á lívsleiðini - triðja sending

**ÚF Hóskvøldið kl. 19.00**

Hvaðani stavar sjeyarmaði ljósastakin, hvussu verður prestur settur í starv, hvat lyfti geva limirnir í meinigheitsráðunum og ymiskt um barnadópin. Fólkalívsfrøðingurin Jóan Pauli Joensen og presturin Marjun Bæk siga frá.

# GESTURIN

*(Bárður Jákupsson)*



- Stundin er komin til at lata yngri kreftir sleppa framat fyri at geva stovninum nýtt innihald. Sjálvur eri eg eisini vorðin eitt sindur troyttur av hesum starvinum. M.a. soleiðis sigur Bárður Jákupsson um avgerð sína at takka fyri seg sum leiðari í Listaskálanum. Eftir at hava røkt hetta starvið í eina fjórðingsøld, ætlar hann nú at fara at gera meira við at tekna og mála sjálvur. Hann fegnast um hølisumstøðurnar hjá Listaskálanum, sum fingust til vega við stóru útbyggingini í 1993, men saknar fleiri starvsfólk enn tey bæði, sum nú eru knýtt at stovninum, so at samskiftið við eitt nú skúlarnar kann fáast í eina fastari legu. Bárður Jákupsson mælir eisini vinnulívinum til í størri mun enn nú at stuðla myndlistini í Føroyum. Lagt til rættis hevur Leivur Hansen.

# Sex and the City (57)

*-Amerikansk virðislønt skemtirøð frá 2001*




Hesin parturin: “Sex og landið”. Carrie fer við Aidan til smáttu hansara úti á landinum, men vendir skjótt aftur til stórbýin, tí hon keðir seg, og er blivin rædd av einum íkorni. Í býnum fer hon út at eta saman við Mr. Big, ið sigur frá at hann í løtuni kemur saman við eini filmsstjørnu. Hon ger av at geva smáttuni ein møguleika afturat, men hesaferð tekur hon Samanthu við. Samantha keðir seg líka til hon fær eyga á bóndan Luke. Stutt eftir dukar hon á dyr hansara fyri at læna eitt sindur av mjólk...

Um somu tíð blíva Miranda og Steve óvinir, tí hann heldur at hon tekur synd í sær, og Charlotte og Trey royna at gera eitt barn, meðan tey eru á vitjan hjá mammu Trey.

Nú eru nýggir partar av Sex & the City. Sarah Jessica Parker hevur høvuðsleiklutin sum New York blaðfólkið Carrie Bradshaw, í hesi virðisløntu røð um fýra yrkiskvinnur, teirra kynslív, og háttir at loysa trupulleikar, ið stinga seg upp í samband við at vera kvinna í tí nýmótans stórbýnum.

*Í leiklutunum: Sarah Jessica Parker, Kim Cattrall, Kristin Davis, Cynthia Nixon, Chris Noth og fleiri.*

## Rás 2

09:45 Orðið - Bíbliulestur v/ Anju Hansen.
10:00 Floksting (e) - Endursending frá í gjár. Hesaferð við Sambandsflokkinum. Sonne Smith leggur til rættis.
11:00 Tónleikur
12:00 Tíðindi
12:15 Tónleikur
13:00 Ynskiløtan - Heilsur frá lurtarum. Send heilsur um (www.ras2.fo) ella á fax. 359990.
14:00 Lýsingar
14:05 Ynskiløtan (framhald)
15:00 Tíðindi
1515 Leysaløtan - Innsløg, prát og tónleikur. Sonne Smith leggur til rættis.
16:00 Indie - Bylgjan - Tónleikasending sum Rúni Korsgaard leggur til rættis
17:00 Norðlýsið - Aktuell sending úr Studio 7 í Klaksvík. John William og Oliver Joensen leggja til rættis.
18:00 Tíðindi
18:15 Tónleikur
19:00 Orð á leiðini (EvR) - Evni: Andaligur búnaðskapur (7. partur av 8) Jógvan Zachariassen leggur til rættis.
19:40 Tónleikur
21:00 Tíðindi
21:15 Orðið (e) - Endursending frá í morgun. Bíbliulestur v/ Anju Hansen.
21:30 Tónleikur
22:00 Girlzone - Undirhaldssending fyri ung, Súsanna Clementsen og Ruth Reinert skipa fyri. Telefon: 35 99 93 Fax: 35 99 90 E-mail: girlzone@ras2.fo
00:00 Liðugt

## Lindin

13.00 Byrjan - Dagsskráin verður lisin
13.05 Bankabók Trúarinnar - eftir C.H. Spurgeon
13.15 Sjólívið v/ Malmberg Olsen
15.00 Horizon Star v/ Stella Zachariassen
16.00 Sjómanssendingin Vitin v/ M. C. Restorff (e)
17.00 Tónleikur
18.00 Dagsins Orð eftir Svenning av lofti
19.00 Brot og bitar ein ørvísi tíðindasending.
19.15 Tónleikur
20.00 Barnalindin (e)
20.55 Bankabók Trúarinnar - eftir C.H. Spurgeon (e)
21.00 Bønarlinjan, beinleiðis sending við gesti vertur er Jenis av Rana - Bønarevnir kunnu ringjast inn frá kl. 20.00. Tlf. 321377 og til ber at senda fax á nr. 321379. - Heimasíða: www.lindin.fo
00.00 Dagsins orð eftir Svenning av Lofti (e)
00.05 Blandaður tónleikur, Dagsins Orð, o.a.
02.00 Ein forvitnislig ferð gjøgnum Bíbliuna (e) - v/ Símun Absalonsen og Jógvan Zachariassen
03.00 Blandaður tónleikur, Dagsins Orð, o.a.
06.00 Vit gevast

# ítróttur

Nr. 195 • fríggjadagur • 11. oktober 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

## 1. Deild menn

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Neistin | 2 | 2 - 0 - 0 | 53 | 44 | 9 | 4 |
| 2 | VÍF | 2 | 2 - 0 - 0 | 30 | 22 | 8 | 4 |
| 3 | H71 | 3 | 2 - 0 - 1 | 71 | 70 | 1 | 4 |
| 4 | StÍF | 2 | 1 - 0 - 1 | 58 | 54 | 4 | 2 |
| 5 | Kyndil | 2 | 1 - 0 - 1 | 52 | 53 | -1 | 2 |
| 6 | Tjaldur | 2 | 0 - 0 - 2 | 26 | 31 | -5 | 0 |
| 7 | KÍF | 3 | 0 - 0 - 3 | 60 | 76 | -16 | 0 |

H71-VÍF 22-30 (9-12)

# Vestmenningar ikki heitir enn

**Hóast H71 byrjaði framúr væl og eitt skifti í seinna hálvleiki nærkaðist VÍF, vunnu vestmenningar ein greiðan sigur í sínum fyrsta spælda dysti í vetur**

HONDBÓLTUR-MENN
*Hilmar Jan Hansen*

Vestmenningar, sum í fjør vunnu bæði grundspælið og endaspælið og gjørdust meistarar, spældu mikukvøldið sín fyrsta dyst í hesum kappingarárinum.

Longu frammanundan hava teir vunnið ein dyst uttan at spæla, tí Tjaldur ikki fekk mannað lið, men nú skuldi so vera sjón fyri søgn, hvat VÍF kann avrika hesa ferð.

Dysturin, sum var á útivølli móti H71, prógvaði sum so ikki tað stóra, og tað kundi eisini skyldast fleiri umstøður. Ein teirra var heilt greitt, at vestmenningar av góðum grundum enn ikki hava spælt seg heitar.

Hinvegin var hetta ein dystur, ið staðfesti, at breiddin og royndirnar enn eina ferð kunnu koma VÍF til góðar, tí alt vóru spælarar, vit hava sæð fyrr í bestu mansdeildini, meðan H71 í vetur roynir seg við fleiri nýggjum, ungum og enn rættiliga ókendum spælarum.

### H71 ynskibyrjan

Kortini var tað júst heimaliðið, ið fekk ta betru byrjanina, og tá tað í tíggjunda minutti gjørdist 5-1 til H71, vóru tað ikki so fáir av heimaáskoðarunum, ið gjørdust spentari og spentari.

Serliga í verjupartinum greiddu hoyvíkingar sína uppgávu til lítar, so illa bar til hjá vestmenningum at sleppa framat.

Men so gjørdi VÍF ein vørr, og góðar tíggju minuttir seinni vóru tað teir, ið vóru á odda 8-7. So skjótt kann skifta, og eftir hetta var VÍF ongantíð aftanfyri aftur í dystinum.

Trý mál vóru á muni í hálvleikssteðginum, og fyrstu fimm minuttirnar av seinna hálvleiki vóru tey blivin sjey, áðrenn tað aftur bragdaði hjá H71.

Unga liðið hjá hoyvíkingum gav kortini ikki upp, og so spakuliga nærkaðust teir stig fyri stig, og tá teir í løtum fóru at mansverja bæði ein og tveir av vestmenningunum, tóktist hetta ørkymla spælið hjá VÍF í rættiliga stóran mun.

Tá bara seks minuttir vóru eftir at spæla, var støðan 22-19 til VÍF, sum framvegis hvørki tóktist fáa fatur á rætta hugflognum ella hugburðinum til at venda dystinum.

### Áki og John vendu tómgongdini

Júst í slíkum løtum kemur tað av álvara VÍF til góðar, at liðið eigur ein góðan skjútta í Áka Olsen og eisini ein ótroyttiligan vong í John Zachariassen, tí teir báðir megnaðu hvør á sín hátt at venda tómgongdini.

Serliga Áki brilleraði við fleiri góðum langskotum, og í tí eina førinum snaraði hann um seg sjálvan og einar tveir ella tríggjar hoyvíkingar, áðrenn hann kliniskt sendi bóltin fram við Péturi Magnusson í H71-málinum.

Og fleiri ferðir, tá álopini hjá VÍF sóu út til at vera uppsteðgað, breyt John ígjøgnum á høgra vongi, har hann síðstu løtuna av dystinum var ósvikaliga tryggur í øllum sínum royndum á málið.

Tískil endaði dysturin við einum tryggum sigri til vestmenningar, nú teir endiliga sluppu at royna seg á vøllinum.



*Ólavur Brimnes, VÍF, roynir at forða Olaf Vestergaard, H71, at sleppa í skotstøðu*
*Mynd: Finnur Justinussen*

Ivaleyst kann bæði eitt og annað rættast hjá VÍF, og tað verður helst eisini neyðugt, tí næsta mótstøðuliðið er Neistin, sum kemur til Vestmannar um vikuskiftið við tveimum spældum sigrum í skjáttuni. Hoyvíkingar fingu í løtum víst, at teir saktans kunnu standa sjálvt teimum bestu kurl, tá væl liggur fyri. Og stóra virðingin, onkrir av fesku spælarunum hava víst mótstøðumonnunum í undanfarnu dystunum, var til tíðir skift út við beinleiðis sjálvsálit, hóast tað ikki rakk so langt hesa ferð.

**Dysturin í tølum:**
**H71-VÍF 22-30 (9-12)**
Málskjúttar:
H71: Halgir Dahl Olesen 11 (1), Bárður Brimsvík 5, Niels V. Niclasen 2, Finnur H. Petersen 2, Hans Jákup Jacobsen 1, Christian Eli Zachariassen 1
VÍF: John Zachariassen 8, Sámal Joensen 6, Áki Olsen 6, Piti Negru 5 (3), Ingi Olsen 3, Ólavur Brimnes 2
Brotskøst: H71 1, VÍF 5
Útvísingar: H71 5, VÍF 3
Dómarar: Hannis Wardum og Ragnar Simonsen

StÍF-KÍF 31-23 (15-12)

# Fýra minuttir avgjørdu alt

**Hóast kollfirðingar fylgdu væl við meginpartin av dystinum, mistu teir við avgerandi brotskasti mitt í seinna hálvleiki møguleikan at taka strandingar aftur**

HONDBÓLTUR-MENN
*Hilmar Jan Hansen*

So tíðliga í kappingini er kanska avmarkað, hvat fólk væntað sær av teimum dystum, ið verða spældir tey fyrstu umførini.

Men á Skála mikukvøldið var ferð yvir spælinum og málini trutu heldur ikki. Bæði StÍF og KÍF løgdu nógv fyri, og tí bleiv tað eisini undirhaldandi.

Strandingar, sum vunnu steypakappingina síðsta ár og fingu bronsu í landskappingini, vóru sjálvandi favorittar, og tá avtornaði, vunnu teir eisini á kollfirðingum við átta málum.

KÍF fylgdi kortini væl við meginpartin av dystinum, og álopsspælið var í løtum gott. Tó var tað kanska eisini fyri ein part avleiðing av, at verjuparturin ikki júst var tann, ið riggaði best hjá StÍF í hesum dystinum.

Burtur sæð frá, at kollfirðingar ta einu ferðina javnaðu, vóru strandingar var á odda allan fyrra hálvleik, sum teir vunnu við trimum málum.

### Avgerandi løtan

Beinanvegin eftir steðgin økti StÍF um munin upp í 18-13, men so svaraði KÍF aftur, og í eina løtu var tað um reppið, at kollfirðingar skuldu fáa strandingar aftur.

Nærri enn tveimum málum komu teir kortini ikki, og tá so annars tryggi brotskastsskjúttin Vagnur Johannesen mitt í hálvleikinum brendi brotskast, kom ordilig ferð á strandingar.

Eftir bara fýra minuttum avgjørdu teir dystin, tá teir fóru frá 23-20 og upp á 27-20. Hesa somu løtuna brendi KÍF fleiri 100 prosents kjansir, og StÍF-málverjin Marian Cirluganescu fekk veruliga víst sínar dygdir í málinum.

Hjá StÍF vóru nógvir um boðið at fáa bóltarnar í málið í hinum endanum, og dysturin boðaði frá breidd á liðnum, har eisini fleiri av yngru spælarunum taka alsamt størri ábyrgd.

KÍF hevði hinvegin ov fáar streingir at spæla uppá, og ikki eydnaðist heldur altíð at fáa tann friðin yvir spælið, ið krevst, skalt tú vinna tær tamarhald í dystinum.

**Dysturin í tølum**
**StÍF-KÍF 31-23 (15-12)**
Málskjúttar:
StÍF: Arthur Johansen 7 (2), Costin Dumitrescu 5 (1), Andre F. Danielsen 4, Leivur Justinussen 4 (1), Sveinur Justinussen 4, Kristjan Petursson 3, Janus Trúgvason 3, Bent Djurhuus 1
KÍF: Vagnur Johannesen 8 (4), Regin Petersen 4, Jákup Dam 3, Eddie Joensen 3, Petur Martin Poulsen 2, Rógvi Weihe 2, Kristjan Madsen 1
Brotskøst: StÍF 5, KÍF 5
Útvísingar: StÍF 4, KÍF 2
Dómarar: Trygvi Mortensen og Kári Hansen